## Trý leys størv á Strandfaraskip Landsins

Strandfaraskip Landsins søkir eftir einum yvirstýrimanni til fast starv. Harumframt verður søkt eftir einum yvirstýrimanni og einum catering fólki til tvey tíðaravmarkaði størv

### Yvirstýrimenn

Hervið er eitt fast starv og eitt tíðaravmarkað starv sum yvirstýrmaður til Standfaraskip landsins leyst at søkja. Tíðaravmarkaða starvið er til 31. januar 2010. Viðkomandi skulu byrja umborð á Teistanum, men skulu kunna verða fluttir á umborð onnur skip sum fyriskipað av leiðsluni. Yvirstýrimennirnir skulu kunna avloysa skiparan.

### Starvið fevnir um

Yvirstýrimaðurin skal vera við til at tilrættaleggja, ein effektivan dagligan rakstur, og at tryggja, at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.

Yvirstýrimaðurin skal eisini verða við til at:

- Tryggja, at trygdin umborð er í samvari við altjóða krøv
- Tryggja, at skipið verður lastað í samsvari við altjóða krøv
- Meta um viðlíkahaldstørvin umborð
- Seta upp mannagongdir fyri viðlíkahaldsarbeiði og dokking
- Samstarva við myngduleikar og aðrar samstarvsfelagar

### Førleikakrøv

- STCW áteknað vinnubræv sum skipari við handilsskipum
- STCW áteknað GMDSS, GOC prógv
- Galdandi heilsuprógv
- Prógv í nýslu av bjargingarútgerð
- Sløkkiliðleiðaraprógv/sløkkileiðari, ikki eldri enn 5 ár
- Kunnleiki til formlig krøv og royndir viðvíkjandi rakstri av ferðamannaskipum

Herumframt vænta vit, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, ert ábyrgdarfullur og ágrýtin, hevur góð samstarvsevnir og góðan røkjuskap.

### Cateringfólk

Hervið er eitt tíðaravmarkað starv sum catering fólk til Strandfaraskip Landsins á Smyrli leyst at søkja. Tíðaravmarkaða starvið er frá 01.mai 2008 til 30. Apríl 2009.

### Starvið fevnir um

Starvið fevnir um alt frá vanligum kafeteria- og kioskarbeiði til uppreiðing, reingerð o.a.

### Førleikakrøv

- Prógv í nýslu av bjargingarútgerð
- Galdandi heilsuvváttan
- Hollur málkunnleiki til føroyskt, danskt og enskt

Annars vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða sjálvstøðugt, og er fyrikomandi, smílandi og røkin.

### Setanartreytir

Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjamálaráðið og Skipara & Navigatørfelagið og sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

### Umsóknir

Umsóknir við avriti av vinnubrævi, prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til :

Strandfaraskip Landsins
Sjógøta 5
Post boks 30
Fo-810 Tvøroyri

Og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 4. apríl 2008 kl 12:00.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jan Haldansen, deildarleiðara, tlf 543041 ella e-post: jah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Løgmálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 6 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í tríggjar deildir: Samferðslu-, Sjó-, og Fíggjardeild.

## HANDILSLÆRLINGUR

**Vit sóknast eftir einum lærlingi til okkara HVS-handil.**

**Tín førleiki**

Vit vóna at tú ert fyrikomandi, íðin, nærlagdur, sjálvstøðugur og skilur týdningin av góðari kundarøkt. FHS ella onnur miðnámsútbúgving er ein fyrimunur.

**Afturfyri bjóða vit**

Eitt starv har ið tú saman við øðrum kemur at taka tær einum spennandi og fjøltáttaðum handli. Tú fært møguleika at hjálpa og leiðbeina kundum okkara, samstundis sum tú fært ábyrgd og møguleika til at menna okkara handil – Stutt sagt eitt spennandi starv í einari fyritøku í støðugari menning.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, **týsdagin 8. apríl.**

Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkara á tel. 312 000

**MARIA POULSEN PF**
Postmoga 182
FO-110 Tórshavn



Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo

Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin tlf 341800



veitst tú ikki tað? Sosialurin



Sig tína meining í Sosialinum

